# 10-dupult útgáva

Skuldi nakar ivast, so varð ivin beindur burtur, tá Shu-bi-dua gav út sína 30-ára jubileumsútgávu. Vanliga verður ein dupult-útgáva roknað sum nakað stórt, men Shu-bi-dua vildi nakað meira. Ikki færri enn 10 fløgur eru í útgávuni, Shu-bi-dua 200, ið ikki heilt óvæntað inniheldur 200 av sangunum hjá fólkakæra bólkinum. Sangir, sum fram um alt lýsa donsku fólkasálina og danska samleikan.




# Heiðraðu ævintýraskaldinum

Seinasta útgávan, sum Shubidua stóð fyri, var ein fløga, sum byggir á ævintýrini hjá H.C. Andersen. Hetta var partur av stóra hátíðarhaldinum kring stóra skaldið, sum í fjør hevði fylt 200, var hann framvegis á lívi. Serstakliga regnaðu rósurnar frá ummælarunum, tá tosið fall á gentuna við svávulpinnunum, sum er ein av sangunum á fløguni. At bólkurin soleiðis var við til at mynda hátíðarhaldið av tjóðarskaldinum sigur helst nakað um, at teir eisini eru tjóðarogn, men fyri tað hava teir so ongan hug at steðga.




## Diskografi

Shu-bi-dua 1 (á fløgu í '90) 1974
Shu-bi-dua 2 (á fløgu í '90) 1975
Shu-bi-dua 3 (á fløgu í '90) 1976
Shu-bi-dua 4 (á fløgu í '90) 1977
78 eren (á fløgu í '90) 1978
Leif i Parken (Live - á fløgu í '90) 1978
Shu-bi-dua 6 (á fløgu í '90) 1979
Shu-bi-dua 7 (á fløgu í '90) 1980
Shu-bi-dua 8 (á fløgu í '90) 1982
Shu-bi-dua 9 (á fløgu í '90) 1982
Shu-bi-dua 10 (á fløgu í '90) 1983
Shu-bi-dua 11 (á fløgu í '90) 1985
Da mor var dreng (uppsamling - á fløgu í '90) 1985
Shu-bi-dua 12 (á fløgu í '90) 1987
Stærk Tobak! (uppsamling) 1991
Shu-bi-dua 13 1992
Live og glade dage (Live & unplugged) 1994
Shu-bi-dua 14 1993
Shu-bi-dua 15 1995
Shu-bi-dua 16 1997
40 bedste (uppsamling) 1997
Shu-bi-læum 73-98 (uppsamling) 1998
Shu-bi-dua 17 2000
Rap jul og godt nytår (jóla- og nýggjárssangir) 2001
Shu-bi-dua 200 (box við 200 sangum) 2003
Symo-ni-dua (við RadioUnderholdningsOrkestret) 2004
Shu-bi-dua 18 2005

eina tí størstu donsku succés-søguna innan danskan tónleik, tó at tey mongu fyrstu løgini vóru fyrsta útgávan mest sum bara innihelt danskar umsetingar og -skrivingar av enskum løgum. Soleiðis komu Stærk Tobak (Twist & Shout) og Rap Jul (White Christmas) eisini frá teirra hondum.

Næsta fløgan var ikki stórt øðrvísi, men tá alt fleiri bólkar fóru undir útgávur úr somu nichu - umsetingunum - skifti bólkurin hest. Fyrsta hittið, sum bólkurin sjálvur skapti við egnum midlum, var Hvalborg, sum var á Shu-bi-dua 3. Eitt lag, sum bar dám av countrytónleiki í eagles stíli. Ein stílur, sum eisini eyðkendi løg sum Vuffeli-Vov og Midsommersangen.

Bólkurin var longu stórur, men við fjórðu LP-útgávuni sprongdu teir øll mørk. Sum fyrsta danska útgávan nakran tíð rundaði sølutalið tey 200.000 eintøkini, og so byrjaði søguskrivingin av álvara. Í dag hevur Shu-bi-dua selt yvir 500.000 eintøk, og enn verða eintøk dag og dagliga langað um handilsdiskarnar.

Og síðani eru hittini bara rullaði eftir samlibandinum. Danmark, Midsommervisen, Minus til plus, Rom & Cola, Den Røde Tråd, Knuden, Sexchikane, We Wanna Be Free, Costa Kalundborg og mong, mong onnur hava ár eftir ár rúgvað upp á donsku radiohitlistunum. Íalt hevur talan verið um 18 serstakar útgávur, sum í besaat biografi-stílierunavngivnar við nummarinum á útgávuni (undantikið fimta útgávan, sum eitur 78-eren). Hartil er talan um uppsamlingar av ymsum lag, eins og teir í 2004 góvu út fløgu við Radio-orkestrinum.

Fólkaogn eru teir av álvara blivnir, og nú - 37 ár seinni - er bólkurin framvegis eins aktivur, sum hann altíð hevur verið. Og hóast tað nú bara er Bundesen, sum er eftir av originalu manningini, so er tónleikurin og stílurin framvegis tann sami. Reint Shu-bib-dua. Reint danskt. Reint fólksligt.